LÝSINGARTORGIÐ

L¸singatreytir fyri —keypis l¸singar:
privatar l¸singar
` mesta lagi 40 orð
bert ein lutur ˆ hv¿rjari l¸sing
h¾gsta s¿luvirði 20.000 kr.

L¸singar, gjaldast skal fyri:
Vanl. l¸singapr'sur:
fr‡ fyrit¿kum og virkjum
fleiri enn 40 orð
s¿luvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

t— minst 70,- kr. við MVG hv¿rja ferð:
L¸singar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hv¿rja ferð:
l¸singar undir teigunum:
ÐDansurÇ ÐFundirÇ og ÐMaturÇ Bill. merktar

Akfør

LÍTIL FITTUR BILUR TIL SØLU
Ein Daihatsu Sirion 1.0 árg. 2001. Hevur koyrt 48.000 km, til sølu vegna keyp av størri bili. Prísuppskot 65.000 kr.
Tlf. 333315/223417

PEUGEOT 206 GTI
til sølu, hevur 148 hestar og nógva útgerð, sær væl út. Biliga til sølu.
Tlf. 260233/258982

MICHELIN DEKK
4 óbrúkt Michelin summardekk biliga til sølu. Std. 175x65/14.
Tlf. 311996 ella 256494

VOLVO 740 GL
til sølu, sýnaður í ár, cd-spælari og eykasett av sportfelgum fylgja við. Er í góðum standi.
Tlf. 509775

SCANIA 143
árg. 1990, sýnaður í januar 2004 til sølu. Skiftilastari.
Tlf. 210493

YNSKIST
4 alufelgur, skulu passa til Opel Astra árg. 96, 14" og hava 4 hol.
Tlf. 229149

TIL SØLU
4 lítið brúkt píkadekk av slagnum Good Year á felgum til Suzuki Baleno.
Tlf. 443105/213292

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

L¸singin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akf¿r ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaætgerð ❑ B‡taætgerð
❑ Bingo ❑ Br³vaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ B¸li ❑ B¿kur ❑ Dansur
❑ D¸r ❑ Fundir ❑ Høsarhaldst—l
❑ Innbøgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pl¿gg ❑ Samband
❑ Søklur ❑ Teldur ❑ T—nleikur
❑ ò t-& sj—nvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:É É É É É É É É É É É É É É ..
Bøstaður:É É É É É É É É É É É É É É
Bygd/b¸ur:É É É É É É É É É É É É É .
Tlf.: É É É ....

»L¸singartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frimerki

DIESELBILUR
biliga til sølu. Nissan Sunny 2.0 d lx, árg. 09/94, sær væl út, krevur ábøtur m.a. vatnpumpu og útstoyt. Prísuppskot 15.000 kr.
Tlf. 225078

DEKK TIL SØLU
4 nýggj summardekk 155/13 til sølu fyri 1200 kr. 4 píkadekk á felgum passa m.a. til Ford Fiesta til sølu fyri 1000 kr.
Tlf. 210979

4 PÍKADEKK
nýggj lameldekk v/ píkum 235/70/16 biliga til sølu.
Tlf. 270935

VINTERDÆK TIL SALG
str. 175/65 R14, er som nye, kørt ca 6.000 km, pris 1.200,-
Tlf. 422290/508529

PÍKADEKK
4 brúkt píkadekk 175-65-14.
Tlf. 221589

SUMMARDEKK
Brúkt Pivelli (P-6000) 185/60-14, 2 stk.
Tlf. 221589

VW PASSAT 1.9 TDI ST.
Silvurgráur, árg. 1998, koyrt 129.000 km. Sportfelgur + eyka sett, nýsýnaður, ikki roykjarabilur. Prísuppskot 118.000 kr.
Tlf. 218398

NISSAN VANETTE CARGO
2.3D, árg. 2000. Nýsýnaður. Koyrt 47.000 km, til sølu.
Tlf. 213909

ORG. FORD ALUFELGUR
Til sølu. Passa til KA Fiesta, 2.000 kr.
Tlf. 210132

VW GOLF
Árg. 87, 1.9 TD, koyrir væl, krevur ábøtur og skal sýnast. Kann eisini brúkast sum eykalutir, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 224756

TIL SØLU
4 Kingstar píkadekk, lítið brúkt og 4 Tyfoon summardekk, lítið brúkt. Stødd 155/80-13. Øll 8 til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 448518 ella 222922

HEILÁRSEKK
4 stk. Michelin heilársdekk, stødd 195/70-15.
Tlf. 228894

FORD FIESTA 1.8 D
Deilir til Fiesta, árg. 92 ella har umleið, ynskjast til keyps.
Tlf. 580367

TOYOTA COROLLA 1.6
Árg. 89 til sølu sum eykalutir.
Tlf. 251656

VW GOLF 2.0 TIL SØLU
Árg. 7/03. Km. 23.500, sum nýggjur. Hevur el-rútar, fjarst. centrallás, stereo, air-con. o.a.
Tlf. 281124

OPEL ASCONA
til sølu sum eykalutir, árg 88.
Tlf. 210104

DAIHATSU APPLAUSE
Árg. 95, koyrt 124.000 km. Sýnaður 04, hevur krók, nýggjar stoytdoyvarar og útstoyt. Selist fyri 18.000 kr.
Tlf. 424559 ella 724559

PÍKADEKK TIL SØLU
Fýra píkadekk 175-65 á felgum til sølu. Prísurin er 2.000 kr. Tvey av dekkunum eru óslitin, og hini bæði lítið slitin.
Tlf. 443329

HONDA CIVIC
myrkareyður, frá 97, til sølu fyri 25.000 kr.
Tlf. 252993 ella 328013

MAZDA 6 TIL SØLU
22.000 km. 2003 juli (sum nýggjur) 170 HK, leðurinntrekk. Eyka sett av alufelgum við píkum o.m.a. Vælhildin.
Tlf. 212779

HONDA CIVIC
Árg. 86, koyrt 193.000 km, koyrir væl, nýsýnaður, nýtt útstoyt, nýggj dekk og gott Sony anlegg fylgir við.
Tlf. 211254

TIL SØLU
Renault 19 GTS, árg. 92, 170.000 km, sera økonomiskur, í góðum standi, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 316166

TIL SØLU
Ford Escort XR3i til sølu sum hann er fyri 6.000 kr. Spoylarasett, nýggj kobling og aðrir nýggir eykalutir fylgja við.
Tlf. 519689, e. kl. 17.00

TOYOTA PICNIC 2.0
Toyota Picnic 2.0, 7 pers., bensin, árg. 09/2000, koyrt 90.000 km., automatisk gear, ABS bremsur, dupult airbag, servostýring, tráðleyst centrallás, el-spegl við varma, el-rútar framman og aftan, tónaðar rútar aftan, el-instilling av forlyktum, tokulyktir framman og aftan, varma í forsetrunum. CD-radio, alu-felgur, píkadekk á felgum, hand free telefon, takboks fylgir við, service bók fylgir við. Ein eigara, er í sera góðum standi. Skal roynast. Prísuppskot: 180.000,-. Ring og fá meir at vita. Helst eftir kl. 16.00
Tlf. 214450 ella 314450

4 VETRARDEKK
á 15" sportsfelgum, passa til Volvo S40, koyrt ein vetur,185/65r15 Pcd:4x114,3, til sølu fyri 3000 kr.
Tlf. 210809

CITROËN BX 1.6 GTi
frá 1992, til sølu fyri kr. 6.000. Sýnaður mars 2004. Bilurin hevur alufelgur við góðum Michelin summardekkum á. Ring
tlf. 217204

VW PASSAT
Nýsýnaður, 1800 motor, í sera góðum standi, brennir lítið, hevur tvey sett av dekkum á sportsfelgum, til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 273097

VW TRANSPORTER
Turbo diesel, árg. 87, til sølu. Gev eitt boð!
Tlf. 503797

Til sølu
Ein svartur Volvo 740 gl í góðum standi, nýsýnaður, er til sølu, um hóskandi boð fæst.
584444

SUZUKI SVIFT 1.3
Árg. 90 til sølu fyri 1.6000 kr.
Tlf. 218778

Amboð

BLANDIMASKINA
Brúkt blandimaskina til 1/2 sekk, og ein trillubora, til sølu samlað fyri kr. 2000. Í finasta standi.
Tlf. 508085

VARIANT VIÐFESTISVOGNAR
til sølu, fleiri model á goymslu.
Kaj Andreasen & Co, tlf. 315600

Arbeiði

18 ÁRA GAMAL
18 ára gamal drongur søkir fast starv, alt hevur áhuga. Havi FHS prógv. Vinarliga ringi til
tlf. 316205/581626, Bjarni

SØKT VERÐUR EFTIR FÓLKI
Søkt verður eftir fólki til handil í Tórshavn at byrja beinanvegin. Talan er um eitt hálvtíðarstarv. Viðkomandi skal kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera kundavinarligur og ágrýtin. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1943/2

TILBOÐ YNSKIST
upp á stoypiarbeiði.
Tlf. 212555

ARBEIÐI
19 ára gomul genta søkir arbeiði í Vágoynni. Havi FHS-prógv.
Tlf. 253713/333139

EG ÁTAKI
mær vaskiarbeiði heima hjá tær, um tú hevur brúk fyri tí. Vinarliga ring
tlf. 223339, Kristina

ARBEIÐI YNSKIST
Ungur drongur ynskir at egna, býr í Kollafirði.
Tlf. 421097

ARBEIÐI SØKIST
18 ára gomul genta søkir arbeiði. Helst okkurt við børnum
Tlf. 228458

HYGG HER
Vit átaka okkum alt timburarbeiði, nýbygging av sethúsum og umvælingar v.m. Tilboð verða givin. Ring og hoyr nærri.
J. H. Bygg, tlf. 273662

FLOTTAN BIL
Eg átaki mær at polera, bona og reinsa bil innan, sum uttan
Tlf. 256495

Barnaansing

TIL SØLU
Simo kombivognur/stólur, myrkabláur við posa 1.200,-. Roscanna stólur við posa reg. hand. lufthjól, sær út sum nýggjur, 1.500,-
Tlf. 755878, Klaksvík

BARNAVINARLIG GENTA/KVINNA
søkist at ansa 8 ára gamlari gentu og 2 ára gomlum drongi eitt kvøld um vikuna.
Tlf. 322590/599590

Barnaútgerð

TIL SØLU
Myrkabláur Brio barnavognur fyri 1200,-. Lift, taska, regnslag og flugunet fylgir við.
Tlf. 312424

KOYRISTÓLUR
myrkabláur koyristólur, í góðum standi, biliga til sølu.
Tlf. 311077

YNSKIST
Ein grulvigarður, har botnurin kann flytast upp, ynskist til keyps.
Tlf. 332546 ella 212546

TIL SØLU
1 ára gamal tvíburðashoppari í sera góðum standi til sølu fyri 800 kr. og ein koyristólur við kalesju, í góðum standi, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 332546 ella 212546

YNSKIST
Er nakar, ið hevur eitt systkinasetur at selja mær. Vinarliga ring
Tlf. 532500 ella 263556

TRYGDARNET/SELI
Til babylift í bili ynskist til keyps.
Tlf. 332809 ella 224861

TREMMUSONG
Beisa bók (ljósabrún) við luxusmadrassu, eina bleyta síðu og eina harða síðu fyri 500 kr.
Tlf. 328119

BILBARNASTÓLAR
Tveir brúktir bilbarnastólar upp til 18 kg biliga til sølu.
Tlf. 456522

BRIO BARNAVOGNUR
myrkagrønur, við lyft og blonkum stelli, er til sølu fyri 2.000 kr. Hann er 3 1/2 ára gamal, brúktur til eitt barn, sær út sum nýggjur.
Tlf. 257363 ella 424636

PEREGO KLAPPSTÓLUR
úr aluminium, til sølu.
Tlf. 312190

YMISKT TIL SØLU
Skrástólur (lux), 250 kr. Vøgga, 250 kr. Beristativ (rygg). 250 kr.
Tlf. 583004

SIMO KOYRISTÓLUR
til sølu fyri 2.500 kr. Bleyt lift, net, regnslag, beriseli, seli, skiftitaska og systkinasetur fylgja við.
Tlf. 583004

Bátaútgerð

BÁTUR TIL SØLU
14 tons útróðrarbátur, fult útgjørdur til línu og snellu, til sølu.
Tlf. 333062/223088

PLASTJOLLA VIÐ BÁTAVOGNI TIL SØLU
Longd 4,6 m x br. 1,5 m. við 3,5 HK leysamotori, mrk. Yamaha, árum, varpi og 3 bjargingarvestum. Prísuppskot kr. 18.000,- Jollan stendur við bátahylin á Argjum.
Tlf. 318569/262250

PÁHANGASMOTORUR
Mercury 80 HK við powertrim og tilhoyri. Nógvir eykalutir fylgja við, til sølu vegna keyp av størri motori.
Tlf. 213195

BÁTAANHANGARI YNSKIST
Hevur tú ein brúktan biligan bátaanhangara, til at krøkja uppí bilin, ring
Tlf. 594040

VOLVO PENTA
TMD 31, 130 hk, motorur v/ brekið, við 2 ára gomlum hydrauliskum geari, til sølu samlað ella hvørt sær.
Tlf. 218082

Bingo

GOTT BINGO
verður í kappróðrarneystinum í Streymnesi týskvøldið 26. oktober kl. 19.00. Bingola verður spælt. Øll eru hjartaliga vælkomin.
H.S.R.

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 8. november kl. 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini.
Glæman

LOPPUR TIL LOPPUMARKNAÐ
Havnar Fimleikafelag sóknast eftir loppum til loppumarknaðin leygardagin 30. oktober. Til ber at ringja til Olgu 221496 ella at koma út í høllina á Stórheyggi fríggjakvøldið 29. oktober kl. 19.00 við lutunum.
Havnar Fimleikafelag

GOTT BINGO
verður sunnudagin 24. okt. kl. 16.00. 6. og 12. spæl gávukort á 1.000,- Burturlutað verða m.a. 5 føroysk krov. Eisini verður spælt bingola, 20 kr. spæl, minibingo o.a.
Kaggin

BINGO
Bingo verður í Felagslonini í Fuglafirði hóskvøldið 21. okt. kl. 19.30. Á lutaseðli: Ísl. lambskrov, nýkomið.
Eldrafelagið Borgin

SURUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini 3. nov. kl. 19.30. Nógvir góðir vinningar. Á lutaseðli m.a. 2 ferðir 500 kr. Drigið verður millum spølini. Eyka eyka spæl verður. Jólabingo verður 1. des.
K.F.U.M.-skótarnir

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar Klubba tórskvøldið 21. okt. kl. 19.00.
Nevndin

BINGO
Gott bingo verður í Eydnuni sunnudagin 31. okt. kl. 16.00. Full pláta: Gávukort 400 kr. Drigið millum spølini, 2 før. krov á lutaseðli.
Sunda Róðrafelag

FRÁ EYDNUNI
Gott Bingo verður sunnudagin 24. okt. kl. 16.00. Høvuðsvinningur: Gávukort frá Smyril Line á 2.000 kr. Eykaspælið 1.800 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini mánakvøldið 25 okt. kl. 19.00. Eyka-eyka spæl verður eisini
Kirkjukórið Ljómur

SANDAVÁGS ÍTRÓTTARFELAG
skipar fyri góðum eydnuhjóli í SÍF húsinum sunnudagin 24. oktober 2004. Byrjað verður klokkan 17.00. Tey, sum vilja stuðla við lutum, kunnu lata teir til onkran av nevndalimunum.
SÍF

SUÐUROYINGAR!
Gott bingo verður í Framtíðini onskvøldið 10. nov. kl. 19.30. Annaðhvørt bingo føroysk gás. Á lutaseðli m.a. olja fyri 1.000 kr., lamb, gæs og dunnur.
Vágs Kappróðrarfelag

GOTT BINGO
verður sunnudagin 7. nov. kl. 16.00 í Framtíðini. Høvuðsvinningur á lutaseðli er ein Apex ferðaseðil frá Atlantsflog.
Vágs Svimjifelag

EYDNUHJÓL VERÐUR Í STØKKHØLLINI
Í Saltangará 31. okt. 2004. Tey, ið vilja stuðla við at lata lutir til eydnuhjólið kunnu ringja til Poulu, tlf. 447073, Amy, tlf. 447718 ella Miu, tlf. 447242. Takk fyri stuðulin.
Eldrafelagið Nón í Saltangará

Burturm. /funnið

DAMU LEÐURHANDSKI
merktur innan við bókstavunum HH er funnin á Viðargøtu á Argjum. Eigarin kann ringja á
tlf. 322250

FLUGUNET
Eitt svart flugunet til barnavogn er funnið í J. C. Svabosgøtu. Eigarin kann ringja
tlf. 221240

HVÍT NOKIA 6610
mist í býnum leygarkvøldið 16 oktober. Vinarliga ring til mín um nakar veit hvar hon er, ella hevur sæð hana. Hon hevur eitt lítið brennimerki á frontinum.
Tlf. 218846-320525

LYKLAR BURTURMISTUR
sunnukvøldið 3. okt. millum kl. 23.00–01.30. Uml. 7 lyklar í einum bundi. Finningarlon verður latin.
Tlf. 315301

Býli

KVINNA SØKIR ÍBÚÐ
Friðarlig kvinna søkir íbúð í høvuðsstaðarøkinum. Royki ikki, fari væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 269763

HÚS TIL LEIGU
í Vági.
Tlf. 421188/257709

ÍBÚÐ/HÚS YNSKJAST
Mamma við 3 børnum ynskir eina stóra íbúð ella minni hús at leiga í Havn. Vinarliga ring
tlf. 581048

ÍBÚÐ YNSKIST
Mamma og 15 ára gomul dóttur ynskja íbúð í Havn, max. 3.500 uttan ljós og varma. Vit eru sera friðarligar, roykja ikki og fara væl um.
Tlf. 316219

ÍBÚÐ YNSKIST
Mamma við tveimum børnum ynskir íbúð við tveimum kømrum í Havn skjótast gjørligt. Max. 4.500 pr. mðr. v/ ljós og hita. Vit fara væl um og gjalda rættstundis.
Tlf. 223339, Kristina

TIL LEIGU
Kamar til leigu í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu, nær við Læraraskúlan.
Tlf. 221158 ella 313799

HÚS Í MIÐBÝNUM Í HAVN
til leigu frá 1. desember. Umleið 100 fermetrar á tveimum hæddum. Á miðhæddini eru gongd, køkur, stova og trappurúm. Á loftinum eru gongd, fýra kømur og wc/bað. Í kjallaranum er atgongd til vaskirúm.
Bill. mrk. R26

MIÐALDRANDI MAMMA
(akadem. útbúgving) við handicappaðum tannáringi og 10 ára gomlum barni, bæði sera still og fólkalig, roykja ikki og drekka ikki,ynskja íbúð við minst 2 køm. til leigu skjótast gjørligt, helst í Eysturbýnum.
Ringið 212803

HÚS YNSKJAST TIL LEIGU
á Streymoynni ella á Eysturoynni skjótast gjørligt.
Tlf. 321265/253491/211266

ÍBÚÐ YNSKIST
í Tórshavn ella nærhendis frá 1. november.
Tlf. 258821

HJÁLP OKKUM
at finna eina íbúð. Vit eru tvey bygdafrell, sum hava fast arbeiði í Havn, men mangla íbúð. Fara væl um og roykja ikki.
Tlf. 220819/212484

HYGG HER!
Vit eru trý fólk,ið ynskja at leiga eina íbúð/hús í Tórshavn. Vinarliga ring
tlf. 229771 ella 257976 e. kl. 16

HÚS TIL SØLU
Hús í Vestmanna til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 505010

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig mamma fyrst í 30´unum við einum barni søkir íbúð ella hús til leigu í Tórshavn/Argjum/Hoyvík. Eg hvørki royki ella drekki. Eg fari væl um. Eg havi fast starv og gjaldi til tíðina. Vinarliga ring
Tlf. 262179

KJALLARAÍBÚÐ TIL LEIGU
Í Tórshavn, uml. 55 fermetrar. Til friðarlig og álítandi fólk, sum ikki roykja, fara væl um og gjalda til tíðina. Depositum krevst. Sámulig leiga. Áhugað skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill. mrk. 1941b

HÚS Í KLAKSVÍK
til sølu. Boð undir 1,3 mill. ongan áhuga.
Tlf. 455812 - 755812

UNGT PAR VIÐ BØRNUM
Ynskir hús ella stóra íbúð til leigu í Suðurstreymoy. Helst í Havn. Gjalda til tíðina
Tlf. 212417

HÚS Í MIÐBÝNUM TIL LEIGU
frá 1. nov. Stødd: uml. 100 fermetrar. Miðhædd, loft, lítið kjallararúm. Loft: 2 kømur, wc/bað, stór gongd. Miðhædd: Durur, gongd, køkur, kamar, stór stova. Kostnaður um mánaðin 6.000 kr. v/ hita, u/ ljós. 1 mðr. depositum krevst. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 240

ELDRI HÚS Í SKOPUN
til sølu.
Tlf. 258761

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST TIL LEIGU
Vit eru tveir trúgvandi menn, sum ynskja at leiga eina íbúð/hús í miðstaðarøkinum frá 1. jan. Roykja og drekka ikki.
Tlf. 212739, kl. 12–18.00

ÍBÚÐ SØKIST
Par í 40-unum søkir eftir íbúð í Havn ella nærhendis skjótast gjørligt. Hava fast arbeiði. Kostnaður max. 4.000 kr. u/ ljós og hita.
Tlf. 504848 ella 256039

HÚS Í SUNDALAGNUM TIL FRAMLEIGU
Fult møblerað við køksbúnýti, uppvaskimaskinu og frystiboks, køkur/stova, hjúnarúm, 2 kømur og kjallari við vaskimaskinu til framleigu til ikkiroykjara frá 1. nov. til 1. juli 2005 ella eftir nærri avtalu. Leigan er 3.200 kr. uttan ljós og hitia. Skriva til Sosialurin, Boks 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1920cc

HØLI TIL LEIGU
Í miðbýnum. Uml. 200 fermetrar.
Tlf. 315438

Dansur

TIL LIMIRNAR Í DANSIFRØI
Leygarkvøldið 23. okt. verður dansa saman við dansarum úr Vágum og Sundalagnum. Byrjað verður kl. 20.00. Seinasta freist at keypa atgongumerki er hósdagin 21. okt.
Dansifrøi

Dýr

HYGG HER!
Ótrúliga fittur, hvítur og svartur loðin kettlingur kann fáast.
Tlf. 265343

HUNDAHVØLPAR TIL SØLU
Kunu latast um 4-5 vikur.
Tlf. 221252

KANINBÚR
Sera gott útikaninbúr til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 263925

EFTIRLÝSING
Okkara ketta er burtur, hon er svørt og hvít og hevði reytt hálsband. Um tit vita nakað, vinarliga ring til mín á
tlf. 261175, Lisbeth

SERA ELSKULIGUR
kettlingur, uml.10. vikur gamal svartur & hvítur (frensur), verður latin djóravini. Kettlingurin er sera fittur, og hann dugir sjálvur at eta og leppa, eisini er hann reinligur. Hann er vanur við børn, og honum dámar væl at spæla. Ringið
Tlf. 316969 ella 218099

HEY HEY
Vil nakar keypa tveir hamstrarar, honir, fyri 60 kr.
Vinarliga ring 332698 ella 532698

PAPAGEYKUR
Uml. 30 cm høgur við alskyns litum til sølu fyri 1.000 kr. Nýprísur 1.600 kr.
Tlf. 580262 eftir kl. 14.00

EIN FITTUR PUDDILHUNDUR
5 mánaðar gamal, kann latast til djóravin vegna ovurviðkvæmi.
Tlf. 506551

HUNDAHVØLPAR
Sera fittir hvølpar verða latnir um uml. 3 vikur. Eru svart/hvítir. Mamman er lítil av stødd.
Tlf. 310213 ella 210213

Húsarhaldstól

TIL SØLU
Lítið brúkt »Euromatic« køliskáp, h. 85, d. 57, b. 55 til sølu vegna keyp av størri. Kostnaður 1500 kr.
Tlf. 281176

Bústaðarveiðan

Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðan fyri nevndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til ogn tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – moguliga hava vit rætta keyparan.
Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.

Nr. 956
Stað: Leynar, Kvívík, Hvítanes, Velbastaður
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: Min. 500 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður 400.000,-

Nr. 957
Stað: Tórshavn – vesturbýnum
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Fam. v/ 2 børnum
Ynskir: 3-4 kømur
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.700.000,-

Nr. 958
Stað: Argir
Slag av veiðu: Sethús (kann eisini vera eldri hús)
Ynskir: 4 kømur
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.450.000,-

Húsamekling

Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
www.husamekling.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16
Keyp og søla av fastari ogn

VASKIMASKINA
Candy C1204 xt fæst við at avheintast. Kann nýtast til eykalutir, legurnar eru farnar, annars í góðum standi. Candy fyritøkan er ikki til longur.
Tlf. 441804

GASSGRÝTA
Gassgrýta til sølu fyri 1500 kr. Diametur: 48 cm, djúp: 37 cm .
Tlf. 219878

Innbúgv

TIL SØLU
Reyðbrúnt sofaborð (Columbia) 140 x 80 x 50 í hædd við einari stórari skuffu. Borðið er úr træ, men hevur glasrút í miðjuni. 1.000,- kr.
Tlf. 270483

HVÍTT SPÍSIBORÐ
+ 4 stólar til sølu fyri kr. 1.000,- Sofaborð til sølu fyri kr. 500,-
Tlf. 319913

VEGNA FLYTING
eru gamlir møblar og ting s.s. ektað teppi, 100 ára gomul veggjaklokka, kommoda og mangt, mangt annað. Opið hús leygardagin 23. okt. á Grønlandsvegi 14.
Tlf. 267310

SONG TIL SØLU
Ein ráhvít jarnsong 90 x 210 við madrassu, keypt frá Ide møblum, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 255279

TIL SØLU
Indisk kommoda br. 51, l. 120 v/ 4 skuffum til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 255279

TIL SØLU
Baðikar l. 160 v/ 2 plátum, brúkt, grønt hondvask, brúkt. Grønt. Wc-kumma, óbrúkt, hvít. Alt samlað, biliga.
Tlf. 444260 eftir kl. 18

TIL SØLU
Sofaborð, reolsystem, 2 skenkar, ein 140 x 200 boxmadrassa og ein vaskimaskina til sølu vegna flyting.
Ring 224818 eftir kl. 18

DUPULTSONG TIL SØLU
Songin er 140x180 og er vælhildin. Prísur 500,-.
Tlf. 506940

STOVUMØBLAR TIL SØLU
Sofasett, 5 persónar leður, kann broytast til 3 persónar. Reolskipan í 4 portum, teak. Spísiborð við 4 stólum. Antikt sofaborð. Standilampa.
Tlf. 312798

NÝGGJ SOFA TIL SØLU
Vegna feilkeyp er ein 3 persóna sandlitað sofa til sølu fyri 1.700 kr. (Er keypt úr FK-blaðnum fyri okt. 2004).
Tlf. 314977 ella 254700

BRENNIOVNUR
60x70, hitar rúm upp til 200 fermetrar, til sølu. Prís tosa vit um. Ein lítil brenniovnur, uml. 40x40 cm kann ganga inn í keypið. Ring og hoyr meira
Tlf. 361327 ella 221935

LÍTID BRÚKT SOVIBRÍK
At sláa út, við penum gráum betrekki til sølu.
Tlf. 441384

JARNSONG TIL SØLU
Økur myrkagrá jarnsong til boxmadrassu 140x200.
Tlf. 310751/257940

TIL SØLU
Nýtt borð + 4 stólar til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 310009, eftir kl. 17.00

REOLVEGGUR
úr lakeraðari bók, 4 sektiónir, 2 m langur, til sølu.
Tlf. 447061

SKENKUR
Ljósur skenkur við yvirskápum til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 310009, e. kl. 17.00

PALISANDER REOL
í trimum sektiónum, til sølu.
Tlf. 312190

GARDINUR
Vælhildnar, brúktar gardinur, mynstrut ráhvítt tilfar, 6 stk. á 230x230 cm. Hvørt stk. er tvær samanseymaðar longdir.
Prísuppskot 250 kr. pr. stk.
Tlf. 311943

GER KVETTIÐ
Hege reol, sum nýggj, hvít beisað, LXH = 120x107 cm. (Keypt í Skemmuni), til sølu fyri 800 kr. Nýprísur 1.295 kr.
Tlf. 311943

TVÆR FUTON SOFUR
til sølu. Onnur svørt við gráum stelli, útlsligin 120 cm, 900 kr. Hin myrkagrøn við svørtum stelli, útsligin 120 cm, 600 kr. Báðar eru frá Ide-møblum.
Tlf.nr. 313372

TIL SØLU
Tvær sofur, 180 og 140 cm breiðar, tvey sofaborð, 65x65 og 130x70, alt sær út sum nýtt og er í góðum standi, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 375290, e. kl. 19.00

Leikur

TIL SALG
Fisher Price Fitness center m. musik (NY).
Tlf. 322120/522120

POOL
Eitt lítið billiardborð 92 x 50 cm er til sølu, góðar kúlur, 2 køir, trýkantur og krit fylgir við. 250,- kr.
Tlf. 270483

RIDDARABORG
til sølu, nógvir riddarar fylgja við, kr. 700,-
Tlf. 447393 eftir kl. 17

Lutaseðlar

MISSIÓNSHÚSIÐ Í LEIRVÍK
Hesi nummur hava vunnið:
1) 3888 2) 5152 3) 1381 4) 0145
5) 3545 6) 2948 7) 0486 8) 3879
9) 3683 10) 3101 11) 1185
12) 3656. Vinningarnir fáast við at ringjaá tlf. 443265. Takk fyri stuðulin.
Tlf. 443265

Matur

HÝSUFLØK
Fyrstafloks hýsufløk, beinfrí og skræðuleys, fryst hvør sær, 50 fløk kr. 500,-
Tlf. 422179/722179

FESK LAMBS- OG VEÐRARKROV
kunnu bileggjast nú. Nøkur seyðarhøvd kunnu eisini bileggjast. Ring
Tlf. 561498

ØÐUR
25 kg – minimum 10 kg. Feskar, verða tiknar so hvørt sum bílagt verður.
Tlf. 510405

Pløgg

TIL SALG
Graviditetsbukser (Ny) fra Events 400,-
Tlf. 322120/522120

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
og tilhoyrandi jakki til sølu. Kjólin er langur við broderii á bróstinum, str. 36. Jakkin hevur eisini broderi, str. 36. Keypt á vári 2004 frá Lilly. Nýprísur uml. 1600 kr. Selist samlað fyri 900 kr.
Tlf. 311430

BLÁTT VOVIÐ
føroyskt fyriklæð til vaksin til sølu. Føroyskt skjúrt, stødd M, svart/reytt til sølu.
Tlf. 314788 eftir kl. 18

HONDBUNDIN MYNSTRUT
troyggja til føroyska búnan, stødd miðal, til sølu
Tlf. 312927

VAKUR HONDBUNDIN
Dópskjóli til sølu.
Tlf. 333052

NÝTT BRODERAÐ TURRIKLÆÐI
fyriklæði og taska til føroyska búnan til sølu.
Tlf. 333052